## Fríggjakvøld er TUTL kvøld í Glitni

Hugnaliga spælistaðið á Skálatrø Glitnir og Plátufelagið úti á Reyni TUTL eru farin undir sera spennandi samstarv, ið fer at ríka tónleikalívið í Tórshavn. Longu nú eru konsertir við Spælimonnunum, A Wizards Journey og Yggdrasil settar á skránna.

Líka síðan Glitnir lat upp, hevur livandi tónleikur verið at hoyrt hvørja viku, ofta upp til fýra kvøld um vikuna. Nú hevur spælistaðið fingið samstarv í lag við TUTL. Samstarvið er skipað soleiðis, at TUTL fer at skipa fyri konsertum í hølunum hjá Glitni – konsertirnar vera fyrra partin av kvøldinum. Tær tríggjar fyrstu konsertirnar eru:

Fríggjakvøldið 24/2 21.00 – 23.00: Spælimennirnir
Fríggjakvøldið 03/03 21.00 – 23.00: A Wiard Journey (Jazz)
Fríggjakvøldið 10/03 21.00 – 23.00: Yggdrasil (jazz /world)

Úr Glitni siga tey, at tey eru sera fegin og spent um samstarvið við TUTL. Tey vóna fólk fer at taka væl móti tiltøkunum.

**nud**

## Yvirlýsing frá Blaðmannafelagnum

Blaðmannafelagið átalar og tekur frástøðu frá, at journalistar – tað veri seg limir felagsins ella onnur fjølmiðlafólk, misnýta sín framíhjárætt í landsins miðlum.

At nýta ella misnýta hendan framíhjárætt, sum onnur enn fjølmiðlafólk IKKI hava, til egnan fyrimun ella vinning, er átaluvert og á ongan hátt umboðandi góðan journalistiskan sið ella tey virðir, sum Blaðmannafelagið setur í hásæti.

Blaðmannafelagið vónar ikki, at ítøkiliga málið við blaðstjóranum á Sosialinum, hevur gjørt ov stóran skaða á trúvirðið hjá føroyskum journalistum. Haraftrat er vónin, at lesarin ikki hevur mist álitið á føroyskan journalistik og tann óhefta tíðindaflutningin, sum flest allir føroyskir journalistar stremba eftir.

Trúvirði og integritetur eru týdningarmiklastu amboðini, limir okkara hava í sínum dagliga arbeiði.

**Nevndin í Føroya Blaðmannafelag**

## Seyðahundakapping á Viðareiði

Leygardagin 25. februar verður seyðahundakapping á Viðareiði. Kappast verður í trimum klassum. Í klassa 1 eru teir ungu hundarnir, í klassa 2 eru teir, sum eru komnir eitt sindur víðari. Í klassa 3 eru teir bestu hundarnir í

Føroyum, og kappingin byrjar leygarmorgunin kl 09:30 og tá kappast teir bestu hundarnir. Bestu hundarnir í øllum klassunum fáa steyp og heiðursmerkir handað aftan á kappingina.

Stuðlað kappingini hava Statoil og Leivur Ellingsgaard Klaksvík. Fyrstu ferð ein slík kapping var í Norðoyggjum, var í februar 2005, og tá luttóku 24 hundar úr øllum landinum.

Áhugin fyri seyðahundum í Norðoyggjum er nú vaksandi og fleiri hundar eru á veg. Teir, sum standa fyri kappingini eru Nils Absalonsen, Tróndur Petersen av Viðareiði og Jákup Jacobsen úr Haraldssundi.



# Sjúklingavegleiðarin hevur nú fingið skrivstovu á Ríkissjúkrahúsinum

**Almanna- og Heilsumálaráðið hevur góð tíðindi til sjúklingar og avvarðandi, ið fara til Danmarkar til kanningar og viðgerð, tí nú hevur sjúklingavegleiðarin fingið skrivstovu á Ríkissjúkrahúsinum**

Almanna- og heilsumálaráðið hevur í eina tíð arbeitt fram í móti at fáa sjúklingavegleiðaranum høli til vega á Ríkissjúkrahúsinum, fyri soleiðis at betra um tænastuna, ið verður veitt sjúklingum og avvarðandi, ið fara til Danmarkar til kanningar og viðgerð. Og hetta er nú eydnast.

Frá 1. mars 2006 hevur sjúklingavegleiðarin á Sjúklingahotellinum Tórshavn, Elionora Olsen, fingið skrivstovu á Ríkissjúkrahúsinum. Skrivstovan liggur í forhølliini, vinstrumegin við høvuðsinngongdina.

Sjúklingavegleiðarin er at hitta á skrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 10.00 til kl. 12.00.

Annars eftir avtalu. Tlf. (0045) 35 45 85 85 - Fartlf. (0045) 51 20 13 99

Uppgávan hjá sjúklingavegleiðaranum er at hjálpa og vegleiða sjúklingum og avvarðandi teirra.

Sjúklingavegleiðarin er somuleiðis bindilið millum viðgerðarstøðini í Danmark, Sjúklingahotellið Tórshavn og viðgerðarstøðini í Føroyum.

Uppgávurnar hjá sjúklingavegleiðaranum eru t.d. at:

- Vitja innlagdar sjúklingar, ið ikki hava samband við Sjúklingahotellið Tórshavn.
- Koma við sjúklingunum til læknasamrøður.
- Vera við til at loysa trupulleikar ella misskiljingar viðvíkjandi viðgerð, røkt ella tænastu, ið ikki altíð kunnu loysast saman við starvsfólkunum á deildini, har sjúklingurin er innlagdur ella gongur til viðgerð.
- Kunna um kanningar og viðgerð.
- Vegleiða um rættindi, ið ein sjúklingur hevur.
- Vegleiða sjúklingum um kæru- og endurgjaldsmøguleikar.
- Tulkatænasta.
- Hjálpa sjúklingum við at fáa meira upplýsingar.

*ahr@ahr.fo*

GHM fyrireikar stórt nýtt tiltak:

# Jazz/Bigband-tónleikur saman við Hans Peturi í Brekkunum!

TÓNLEIKUR

Heystið 2005 hevði GHM eina stóra og krevjandi skrá við klassiskum harmoniorkesturtónleiki við Onnu E. Klett sum solisti undir leiðslu av Bernharði Wilkinson. Konsertir vóru í bæði Fríðrikskirkjuni og í Norðurlandahúsinum. Um jólini hevði stórt felagskór, sett saman av Felagskórinum Gøta/Leirvík, Vestmanna sangkóri og Tórshavnar kamarkóri, saman við GHM stórfingnar jólakonsertir – heilar 3 í tali - undir leiðslu av Kára Bæk og við Eivør Pálsdóttir sum solisti.

Fyrsta verkætlanin hjá GHM í 2006 er longu væl á leið komin. Ætlanin er at lýsa nøkur tíðarskeið í jazzsøguni við serligum denti á klassiskan bigband tónleik hjá t.d. Duke Ellington, Count Basie, Glenn Miller. Byrjað verður við dixielandstílinum, síðani verður hildið fram við kendum og elskaðum løgum, soleiðis sum tey kendu orkestrini framførdu tey.

Til at knýta jazz-søguna saman, hevur GHM biðið saxofonleikaran Hans Petur í Brekkunum at siga frá. Men han skal ikki bara leiða leikarar og áhoyrarar ígjøgnum hetta tíðarskeiði, men eisini luttaka sum sololeikari saman við orkestrinum.

Hans Petur, 32 ár, er vaksin upp í Havnini, men hevur búð í Danmørk seinastu 12 árini. Í 2000 fekk hann prógv frá Det Rytmiske Konservatorium í Århus. Eftir hetta hevur hann virkað, sum freelance tónleikari,



*Hans Peturi í Brekkunum*

tónaskald og vegleiðari. Klüvers Bigband í Århus hevur javnan sent boð eftir Hans Peturi, og í 2005 vann tónleikaverk hansara fyrstu virðisløn í tónleikakapping, sum Tórshavnar Stórband skipaði fyri.

Hans Petur hevur traðkað sínar barnaskógvar í GHM.

GHM hevur heitt á Peder Riis-Jensen, lærara í musikkskúlanum, um at vera leiðari fyri hesari jazz/bigband-tónleika verkætlanini.

Sunnudagin í føstuinngangi 26. februar, spælir GHM 2 konsertir við somu skrá, við tí rætta dáminum og huglagnum, sum hoyrir hesum slagi av tónleiki til.

**Konsertir verða hin 26. februar 2006:**

kl. 15.00 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
kl. 20.00 á Lærara-skúlanum í Tórshavn

# Poppkorn í Runavík

**NSÍ og ÍF eru í røttum føstulávintshýri. Leygardagin 25. februar fer hetta at síggjast og ikki minst hoyrast í ítróttarhøllini í Runavík, har ið Poppkorn og tey bæði Angela og Hannibal fara at framføra**

KONSERT
*Tíðindaskriv frá NSÍ og ÍF*

Leygardagin 25. februar skipa NSÍ og ÍF fyri størfingnari konsert við gentubólkinum Poppkorn. Umframt stjørnubólkin úr Sandoy verður annað undirhald á skránni.

Tiltakið verður í ítróttarhøllini í Runavík, har ið vit leggja í vaðið klokkan 16.30 við burturluting, føstulávintsbollum og kakao. Grýlur i øllum aldri eru serliga vælkomnar!

Á sjálva konsertina við Poppkorn-gentunum, sum byrjar klokkan 17.00, sleppa kundar hjá Kalli ókeypis. Teir kunnu heinta atgongumerki í Kall-handlunum á Óðinshædd og í SMS ella við dyrnar í ítróttarhøllini í Runavík ein tíma undan konsertini.

Tey, sum ikki longu eru Kall-kundar, kunnu taka av sertilboði frá Kalli. Umframt ókeypis atgongumerki fáa hesi eitt eintak av Poppkorn-fløguni, ið annars hevur verið útseld! Í gávupakkanum er eisini ein Frælsi dós nummarið og 100 krónur í talutíð. Øll onnur kunnu keypa atgongumerki við dyrnar frá kl. 16.30. Atgongumerkini kosta 60 krónur. Avmarkað atgongd!

Umframt popp frá Poppkorn fara NSÍ og ÍF at bjóða gott undirhald, ið eina mest er til tey yngstu. Fyri teimum fara sjónvarpsverturin Angela og klovnurin Hannibal at framføra.

Aftaná á konsertina og undirhaldið á pallinum heldur tiltakið fram eina løtu. Bestu grýlurnar verða avdúkaðar um sjey-tíðina leygarkvøldið, og fáa tær góðar vinningar frá Kalli. Øll eru hjartaliga vælkomin í ítróttarhøllina í Runavík leygardagin.